MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Starv sum skúlastjóri í Hoyvíkar Skúla

Hevur tú áhuga og hegni at átaka tær leiðslustarv í føroyska fólkaskúlanum og virka fyri alsamt at menna skúlans arbeiði, so hevur tú møguleika at søkja starvið sum skúlastjóri í Hoyvíkar Skúla. Í Hoyvíkar Skúla eru 347 næmingar í 1. - 9. flokki, og 31 lærarar í føstum starvi. Starvið verður sett frá 1. mars 2016.

**Um starvið**
Skúlastjórin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans. Hann skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim, og í samstarvi við foreldrini virka fyri, at næmingarnir fáa eina mennandi og fjølbroytta undirvísing.

Harumframt skal skúlastjórin vera førur fyri at inna eina mennandi starvsfólkaleiðslu, skapa umstøður hjá tí einstaka fyri samábyrgd og ávirkan og tryggja, at lærarar skúlans hava umstøður fyri fakligari menning. Eisini skal skúlastjórin skapa virðing fyri skúlanum og leggja dent á støðuga menning.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalærara-útbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir og skeið í leiðslu.

**Setanarviðurskifti**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Hoyvíkar Skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokkinum 36.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag, men broytingar í skúlabygnaðinum í kommununi kunnu viðføra broyting í flokkingini.

**Umsóknir**
Umsókn saman við avriti av lærarapróvgvi, C.V. og møguligum viðmælum skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. februar 2016.

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044.